Páll á Reynatúgvu fær almennamál

Páll á Reynatúgvu verður landsstýrismaður í almannamálum, og Høgni Hoydal og Karsten Hansen halda fram við sínum málsøkjum.

LANDSSTÝRISMENN
Heri á Rógvi

Tað er nú greitt, hvønn Tjóðveldisflokkurin hevur valt at umboða flokkin í landsstýrinum. Høgni Hoydal og Karsten Hansen halda fram við ávíkavíst fíggjarmálum og lógarmálum.

Annlist Bjarkhamar, sum verður umrødd aðrastaðni í blaðnum, verður landsstýrismaður í mentanarmálum.

Í almannamálum verður tað Páll á Reynatúgvu, sum verður landsstýrismaður.

Páll á Reynatúgvu er 34 ára gamal. Hann er valdur á ting fyri aðru ferð í Sandoyar valdømi, og hann hevur eisini áður stillað upp. Hann er útbúgving fysioterapeutur. Seinastu fýra árini hevur hann verið formaður fyri trivnaðarnevndina í løgtinginum. Hann er giftur Kristinu og tey eiga tvey børn.

Páll á Reynatúgvu verður nú landsstýrismaður í almannamálum

T kk

jarta tøkk f ri a a ke l tá k ri
að r á i er á i og abbi okkara

o
ki ari ttað r r e t a a

o ði og arð jarðað r.

Tøkk f ri bl r kra ar og telefo ri gi gar.
Tøkk til re t kirkj t arar og gra arar. Tøkk til
e t e f ri akra a g. Tøkk til t kk øll
á i ka átt jál t til ið jarðarferði a.

Tøkk øll tit ið f lg o til
a ara ei a ta l ar tað.

Vegna tey avvarðandi
A e t
o

T kk

jartaliga takka it øll f ri a a ke l
tá k ra tir fa tir og o t r okkara

o e e
T ørgøt T r a

a aði t og arð jarðað.

i er tøk tøkk til t kk r a a
ta ei a t t ði a.
Tøkk til jar a k r t f ri g ð
og tro tarr k orð ei i ka elli
og kirkj i og tøkk til berarar
kirkj t arar a garar og gra arar.

Tøkk f ri bl r kra ar eil a ir og ri gi gar
og tøkk til t kk øll f lg e i
til e ara ei a ta l ar tað.

Fyri tey avvarðandi

Børn í skúla seinnapart orsakað av hølistrupulleikum

Tá ið bestu tímarnir av degnum eru farnir, fara fleiri børn í fyrsta flokki í skúla í Havn. Hølistrupulleikar eru orsøkin og frá komandi skúlaári má Kommunuskúlin í Havn eisini taka til takkar við hesa loysnina. Tó ikki so leingi, tí um eitt ár verður nýggjur bygningur tikin í nýtslu til 1., 2. og 3. flokk

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

Hølistrupulleikar á fleiri skúlum í Havn gera, at yngstu næmingarnir mugu ganga í skúla seinnapart. Soleiðis hevur verið á Argjum og í Hoyvík í nógv ár, og frá komandi skúlaári mugu eisini børnini, sum byrja í 1. flokki í Kommunuskúlanum, sláa seg til tols við at skula í skúla seinnapart. Í fleiri ár hevur hetta ikki verið neyðugt í Kommunuskúlanum, men seinastu fimm árini er næmingatalið vaksið við meiri enn 200 børnum, úr 380 í 588 frá komandi skúlaári.

Karmarnir í Kommunuskúlanum verða kortini ikki trongir so leingi afturat, tí um eitt ár tekur skúlin í nýtslu nýggjan bygning. Barakkin á skúlaøkinum, sum yngstu flokkarnir halda til í í dag, verður tikin niður í summarsteðginum og nýggjur skúli bygdur.

– Tá ið hesin bygningurin er liðugur, verður pláss fyri øllum næmingunum. At tað verður ógvuligt trongt eitt ár afturat fara vit at klára við vælvild frá øllum pørtum, tí vit síggja fram til at taka ein nýggjan bygning í nýtslu um ikki so langa tíð, sigur Hanus Joensen, skúlastjóri í Kommunuskúlanum.

Fyrsti flokkur, sum byrjar í Kommunuskúlanum komandi skúlaár, byrjar kl. 12.45 og verður liðugur umleið kl. 16.00. Áðrenn skúlatíð eru tey í frítíðarskúla.

– Skulu tey byrja fyrr á degnum, mugu tey í frítíðarskúla aftur eftir skúlatíð, og tað ber illa til, sigur Hanus Joensen.

Nútímans

Nýggi bygningurin, sum verður bygdur til Kommunuskúlan, verður í tveimum hæddum. Har vera seks skúlastovur og 1., 2. og 3. flokkur fara at halda til har, umframt vera aðrar stovur til annað, sum hoyrir til undirvísing í dag.

– Skúlin verður í allar mátar nýtímans. Ein spennandi ætlan við nútímans skúlatankum, sigur Hanus Joensen.

At nýggjur bygningur verður bygdur afturat til Kommunuskúlan, útloysir ikki fleiri stovur á verandi skúla.

– Allar stovur verða fullar kortini, tá ið alt er liðugt, tí næmingatalið veksur støðugt. Í 2003/4 verður ein flokkurt afturat, sigur Hanus Joensen.

Tað er misjavnt, hvussu skúlastjórarnir lata at viðvíkjandi tí, at sjey ára gomul børn byrja skúladagin, tá ið stórur partur av degnum er farin.

– Børnini eru illa fyri og móð, og hava ikki góð bindini til at sita still, lurta og læra. Bestu tímarnir av degnum eru farnir, tá ið hesi koma í skúla. Vit vita jú, at betur tú ert fyri, meiri lærir tú, sigur Marjun Holm, skúlastjóri í Argja skúla.

Børnini í 1. flokki í Argja skúla byrja kl. 11.40 og eru liðug uml. kl. 15.00.

– Foreldrini eru kedd av, at soleiðis skal vera, men har er einki at gera fyrr enn vit fáa onnur og fleiri hølir, sigur Marjun Holm.

Sambært skúlastjóranum í Hoyvíkar skúla, Petur P. Dahl, lata lærararnir væl at børnunum í 1. flokki, sum byrja í skúla kl. 11.50. Í Hoyvíkar skúla eru nítjan skúlaflokkar og skúlin ræður yvir seytjan skúlastovum.

– Børnini eru væl fyri. Hugburðurin er broyttur seinni árini. Nú duga fleiri at síggja fyrimunirnar við at ganga í skúla seinnapart í og við, at skúlin er rúmligari tá. Høvdu børnini byrjað í skúla seinni, kanska longri út á seinnapartin, rokni eg avgjørt við, at tey høvdu verið verri fyri, sigur Petur P. Dahl.

At yngstu næmingarnir so at siga hava skúlagarðin fyri seg sjálvar, metir Hanus Joensen eisini er ein fyrimunur.

– Tað er trongt í skúlagarðinum, um 600 næmingar skulu vera har samstundis og vit hava ikki møguleika fyri at býta garðin upp, sum tað verður gjørt aðra staðni, sigur hann.

Óheppið

Nógvar ætlanir eru í umbúna á skúlaøkinum í Tórshavnar kommunu. Fremst stendur umrødda nýbygging til Kommunuskúlan. Eisini formaðurin í mentunarnevnd Tórshavnar býráðs, Heðin Mortensen, heldur, at tað er óheppið, at sjey ára gomul børn skulu byrja í skúla so seint út á dagin.

– Tað er ikki meiri enn næst best. Børnini hava jú verið virkin allan fyrrapartin og eru vorðin móð, tá ið tey skulu í skúla. Eisini setir tað nógv foreldur í eina trupla støðu viðvíkjandi ansing, tí skúlin er liðugur, áðrenn foreldrini eru liðug at arbeiða, sigur Heðin Mortensen.

Fleiri skúlar í Havn eru ov lítlir og tað gongur út yvir tey, ið fara í fyrsta flokk

Mynd: Finnur Justinussen

Bill Justinussen:

– Tað fer at merkjast

Fyrsti landsstýrismaður Miðfloksins lovar, at tað nú fer at merkjast, at teir hava fingið ein mann í landsstýri. Fyrst á skránni verður at seta eina skúlalæknaskipan í verk, sum Miðflokkurin hevur lovað sínum veljarum. Eisini er ætlanin at menna eina hugburðsbroyting. Vit hava hitt nýggja landsstýrismannin Bill Justinussen

SAMRØÐA
Heri á Rógvi

Hann er kanska ikki so kendur í politikki. Nýggi landsstýrismaðurin, Bill Justinussen, hevur stillað upp hvørja ferð síðani valið í 1988. Fyrstu ferðirnar stillaði hann upp fyri Kristiliga Fólkaflokkin. Hann var ein av teimum, sum stovnaðu Miðflokkin í 1991, og við valið í 1990 var hann um reppið at røkka inn á ting í Suðurstreymoyar valdømi.

Hann er av Glyvrum, og tað er eisini í Eysturoynni, at hann hevur stillað upp seinastu ferðirnar.

Hann varð frelstur, tá hann var 13 ár. Hann er sonur Gunnvu og Bjørn Justinussen, og nú er hann eisini landsstýrismaður – 38 ára gamli Bill Justinussen.

– Tað er væl eitt tað hægsta ella eitt av teimum ynskjunum, tú kanst hava í royndunum at fáa ávirkan, at gerast tingmaður ella landsstýrismaður, sigur Bill Justinussen, tá spurt verður eftir orsøkini til, at hann hevur valt at átaka sær hendan álitissess.

– Eg leyp tó ikki út í tað. Eg havi hugsað meg væl um, tí eg ynski ikki, at hetta skal ganga útyvir familjuna, sigur Bill

FAKTA

Navn: Bill Justinussen
Aldur: 38 ár
Hjúnastøða: Giftur við Malenu (fødd Gregersen)
Børn: Trý, 13,8 og 6 ára gomul.
Útbúgving: Student-, Handilsskúla og HD fyrsta part.
Starv: Bókhaldari (landsstýrismaður)

Familja og heilsa

Bill Justinussen verður landsstýrismaður í familju- og trivnaðarmálum. Hetta er at meta sum ynskistøða fyri Miðflokkin, sum undan valstríðnum bar fram ynski um ein familjumálaráðharra.

Økið hjá Bill Justinussen kemur at umfata alt sjúkrahúsverkið og øll øki innanfyri heilsu. Eisini fara íbúðarmál, dagstovnar og rúsevnismál at hoyra undir økið hjá Bill Justinussen. Nýggi landsstýrismaðurin av Glyvrum fer at halda til saman við landsstýrismanninum í almannamálum í Almanna- og heilsumálastýrinum. Fyribils hevur ikki verið tosað um, at víðkað stýrið.

Hesi mál, ið Bill Justinussen nú skal umsita, eru tey somu, ið Miðflokkurin legði størstan dentin á í valstríðnum.

– Mann vil við einum landsstýrismanni í familjumálum hyggja eitt sindur frameftir. Vit vilja arbeiða við fyribyrging og heilsufremjan ístaðinfyri bara at royna at sløkkja eldarnir, sum tað ofta hevur verið við verandi stýrum,serliga tí arbeiðsbyrðan hevur verið so stór, sigur Bill Justinussen.

Hugburðurin broytast

– Eg vil styrkja um upplýsingina. Endamálið er at fáa eina hugburðsbroyting, sigur ein avgjørdur Bill Justinussen.

Rúsevnismál hoyra eisini undir hansara málsøki, og har ætlar nýggi landsstýrismaðurin at leggja serliga stóran dent á fyribyrging.

– Upplýsing fram um forboð, ljóðar aðalsetningurin í politikkinum.

– Eg haldi, at vit skulu læra fólk ikki at drekka, heldur enn at læra tey at drekka. sigur Bill Justinussen.

Bill Justinussen og Miðflokkurin meta, at tað hevur stóran týdning, at mann fer væl við sálini, og teir raðfesta eisini lívskvalitetin ovarliga.

Ætlanin hjá Bill er at gera kanningar fyri at finna útav meira um lívskvalitetin hjá tí einstaka, har støði verður tikið í ynskjunum hjá tí einstaka.

– Familja skal vera kjarnin í samfelagnum.Hendan samgongan er samd um, at heilsu- og familjuøkið skal raðfestast ovarliga, sigur Bill Justinussen.

Skúlalæknin fyrst

Eitt av lyftunum í valstríðnum frá Miðflokkinum var at seta eina skúlalæknaskipan í verk. Hesum ætlar Bill Justinussen eisini at virka fyri frá byrjan av sum sítt fyrsta mál sum landsstýrismaður.

Eisini skal hann og stýri í holt við at orðað ein framtíðar familju- og heilsupolitikk, og hetta verður heldur ikki nøkur hissini uppgáva.

Ætlanirnar hjá Bill Justinussen eru eisini at halda fram við trimum sjúkrahúsum í Føroyum, og hann roknar eisini við, at tá Norðoyatunnilin vil gera tað møguligt at Eysturoynni kann gera sær meira dælt av sjúkrahúsinum í Klaksvík.

Bill metir eisini, at tað fer at gera hansara uppgávu munandi lættari í mun til hansara undangongumann, at eitt sjúkrahús í hesum døgum verður bygt.

– Mann vil við einum landsstýrismanni í familjumálum hyggja eitt sindur frameftir. Vit vilja arbeiða við fyribyrging og heilsufremjan ístaðinfyri bara at royna at sløkkja eldarnir, sum tað ofta hevur verið við verandi stýrum,serliga tí arbeiðsbyrðan hevur verið so stór, sigur Bill Justinussen

Eisini ætlar Bill Justinussen at virka fyri lógum, ið betra um trivnaðarstøðuna.

Kristindómur

Sum Miðflokkinum so líkt leggur Bill Justinussen eisini stóran dent á tað andaliga lívið – kristnu lívsáskoðanina.

– Eg varð frelstur, tá eg var 13 ár. Tað hevur eisini ávirkað meg nógv í politikki, sigur Bill Justinussen.

– Tit koma at merkja tað, at tað nú kemur ein landsstýrismaður úr Miðflokkinum, sigur Bill Justinussen.

Hann heldur, at nú Miðflokkurin hevur fingið ein landsstýrismann, so kann vera við til at fáa flokkin at veksa.

Tíðin fer at vísa, hvat Bill Justinussen fer at fáa burturúr, nú hann verður landsstýrismaður.

Annlis Bjarkhamar landsstýriskvinna í mentamálum:

– Eg vil vaska talvuna reina

28 ára gamla Annlis Bjarkhamar verður landsstýriskvinna í mentamálum. Hon sær tað sum ein forkunnugan møguleika, og hon ætlar at vaska talvuna reina. Kjakið um fólkaskúlin skal vendast til at gerast positivt

LANDSTÝRISKVINNA
Heri á Rógvi

Á miðjara nátt týsnáttina ringdi telefonin hjá Annlis Bjarkhamar. Tað var frá Tjóðveldisflokkinum, og boð vóru eftir henni at koma oman á Gamla apotek til eitt prát. Hon fekk beinanvegin varhugan av, at nú var okkurt á veg, og so var eisini. Niðri á Gamla apoteki fekk hon nevniliga bjóðað at gerast landsstýriskvinna í mentanarmálum.

– Tey høvdu ógvuliga góðar grundgevingar, har tey m.a. søgdu, at tað var umráðandi at gera íløgur í framtíðini. Samstundis varð tað mær gjørt greitt, at hetta var eitt stórt og rúgvismikið arbeiði. Eg hevði ikki nakran hóming av, at eg var í uppskoti til at gerast landsstýrismaður, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon valdi at taka av tilboðnum, og um stutta tíð kann hon alment kalla seg fyri landsstýrismann.

– Eg vil vaska talvuna reina. Eg haldi, at tað er nógv vanahugsan, hvør eigur at vera landsstýrisfólk. Hevur tú hugsjónirnar, so haldi eg avgjørt, at tú hevur fortreytirnar, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon sigur altíð havt verið virkin innanfyri mentanarliga øki, og hetta kann mestur roknast sum ein av orsøkunum til, at tað gjørdist hon, sum skal í landsstýrið.

Hon sær tað sum ein forkunnugan møguleika at sleppa at royna sæti í landsstýrinum, ið eitt nú Tórbjørn Jacobsen hevði um hendi eina tíð og fýra tjóðveldismenn hava roynt seinastu fýra árini.

– Eg havi nøkur heilt greið mál. Tað hevur ongantíð ligið til mín at stilla upp. Eg haldi eisini, at tað kann gerast ein fyrimunur, tá eg kanska ikki eri so slípað, sigur Annlis Bjarkhamar, sum ongantíð hevur stillað til eitt løgtings- ella fólkatingsval.
Hon sigur seg hava greiðar hugsanir, sum fara at merkja hennara arbeiði sum landsstýrismaður næstu árini.

–Sum læraraskúlanæmingur liggur fólkaskúlin sjálvandi mær rættiliga nær. Eg ætli eisini, at fáa vent tað nógva av kjakinum um fólkaskúlan til at gerast meira positivt, sigur Annlis Bjarkhamar.

Eisini fær hon nógv at síggja til í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni, ið fellir innanfyri hennara málsøki.

Annlis Bjarkhamar heldur, at tað hevur stóran týdning, at mann ger seg greitt, hvat tað er, mann vil.

– Eg haldi, at mentanarøkið er grundleggjandi. Vit skulu ikki leggjandi hond á skapandi mentan. Listin og mátturin má veksa, sigur Annlis Bjarkhamar.

– Eg vil vaska talvuna reina. Eg haldi, at tað er nógv vanahugsan, hvør eigur at vera landsstýrisfólk. Hevur tú hugsjónirnar, so haldi eg avgjørt, at tú hevur fortreytirnar, sigur Annlis Bjarkhamar

28 ár

Annlis Bjarkhamar er 28 ára gomul, og hon er ættað úr Vági, men í løtuni búsitandi í Havn. Hon gongur á Føroyar læraraskúla á síðsta ári. Hesa seinastu tíðina hevur hon eisini starvast á Eysturskúlanum í praktikk. Hon hevur aktiv í Tjóðveldisflokkinum seinastu átta árini. Ein stóran part av hesari tíðini hevur hon verið formaður fyri Unga Tjóðveldið, sum hon eisini var við til at endurstovna í 1998. Hon hevur gingið á háskúla tvær reisir, og hon hevur eisini roynt seg sum útvarpsfólk, og nú verður hon altso landsstýrismaður í mentanarmálum.

Hon verður yngsti landsstýrismaðurin nakrantíð, og fyrsta tjóðveldiskvinna í landsstýrinum síðani Jóngerð Purkhús.